# ØLKENNARI LETUR VÆL AT FØROYSKUM ØLI

UNDIR YVIRSKRIFTINI **»NORDATLANTISK ØL Í TOPKLASSE«** DYGDARMETIR DANSKI ØLUMMÆLARIN **ERIK LÜTHJE FRANDSEN** FLEIRI AV ØLUNUM HJÁ **FØROYA BJÓR**. OG UMMÆLINI ERU YVIRHØVUR RÆTTILIGA GÓÐ



**ØLUMMÆLI**
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Fleiri og fleiri føroyingar eru vorðnir áhugaðir í øli sum smakkdrykk. Og tað eru eisini fleiri føroyingar, sum nú eru limir í teimum alsamt vaksandi donsku ølklubbunum.

Ein teirra er Bjarni Juul Petersen, sum er limur í Selskab for Vestjydsk Ølkultur. Hann hevur heitt á Erik Lüthje Frandsen, ið hevur verið limur í klubbanum í mong ár, harav fleiri í nevndini, um at meta um nøkur av ølsløgunum hjá Føroya Bjór.

Erik Lüthje Frandsen sigur soleiðis um uppgávuna:

Føroya Bjór hevur aftur gjørt vart við seg við at bryggja nýggj ølsløg, ið vekja smakkleykirnar til gleði og frøi. Tað hevur verið ein sonn frægd at royndarsmakka hesar nýggju, gyltu droparnar frá frálíka bryggjarínum í Klaksvík.

Eg tók ímóti avbjóðingini av royndarsmakkingini við ikki sørt av eyðmýkt. Hetta er ein avbjóðing ið sjálvandi krevur ein ávísan fakkunnleika, men kortini ikki meiri enn at tað eru matligu smakkleykirnir, ið skulu njóta gylta bryggið. Eg gjørdi tí av, at mínir góðu ølvinir, Ivan Læbel og Tonny Birkekjær, skuldu vera mínir hjálparar. Vit skipaðu smakkingina, so hvør øl varð rættvíst mett og út frá somum kriterium.


*Erik Lüthje Frandsen*

Tilsamans royndarsmakkaðu vit átta øl. Ikki allar eru nýggjar, men allar eru mettar út frá líka stigi, so til ber at samanlíkna.

MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG

## Gull

Ein veruliga deilig, traditionel øl, flott og góðan fullan smakk. Hon er ljós á liti, kanska eisini ov ljós í mun til smakkin, men tað skal takast sum ein subjektiv viðmerking. Hon fyllir væl í munninum við góðum beiskum eftirsmakki – ein veruliga góð øl, sum ein gulløl traditionelt skal vera. Hetta er ein øl, ið eg við stoltleika borðreiði fyri góðum vinum eitt hugnakvøld. Ein øl, sum heilt klárt er ein sukkse.




## Classic

Ein øl, ið ikki fær toppkarakter. Hon virkar fløt og keðilig. Um hon ikki er fremsta søluvøra, fara vit ikki at sakna, um hon verður tikin úr ølúrvalinum til fyrimunar fyri meiri spennandi ølsløg. Vit hava eina kenslu av, at hendan Classic er bryggjað, bert tí flestu onnur bryggjarí hava eina Classic øl, men her kunnu vit bara siga, gangið ikki í fótasporunum hjá øðrum.

**KEÐILIGT**

